## Kórkonsert í Fuglafirði

Ein yndislig, stutt jólakonsert, har øll eru við í einum litríkum jólaljómi. Soleiðis ljóðar innbjóðingini til eina kórkonsert í Fuglafjarðar kirkju, sum verður komandi sunnukvøld klokkan 21. Øll eru sjálvandi hjartaliga vælkomin, verður sagt úr Fuglafirði.



## Wenzel sponsorerar festivalin í Kirkjubø

Bilasølan P/F Wenzel sponsorerar tónleikafestivalin »Við Múrin«, sum verður í Kirkjubø frá 16. til 18. juli 2008. Talan verður um tveir bilar, sum verða skiftir út við jøvnum millumrúmi. Fyrstu bilarnir vera tveir Ford Ka, síðan verða teir útskiftir við aðrar Ford bilar og onkrar Volvo, sum nú eisini verðaw seldir hjá P/F Wenzel. Mikudagin handaði Jógvan Højgaard, stjóri hjá P/F Wenzel, lyklarnar til bilarnar til Mark Joensen og James Olsen frá festivalinum.

# Tað fer at svíða tey næstu árini

**- Tað eru nógv, sum føla seg illa viðfarnan, men í 2010 ár verður neyðugt við fleiri skerjingum, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, nú síðsta hond skal leggjast á fíggjarlógina fyri næsta ár**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta verður ongin dansur á rósum.

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum, staðfestir, at fíggjarliga fer tað at svíða nógva staðni næsta ár.

Í gjárkvøldið legði fíggjarnevndin sítt álit fyri Løgtingið um fíggjarlógina fyri næsta ár og gongst sum ætlað, verður tað endaliga samtykt í morgin.

Men samstundis staðfestir Anfinn Kallsberg eisini, at tað verður neyðugt hjá politiska myndugleikanum at standa sum kletturin fyri at fáa skútuna aftur á beint sum skjótast.

Tí staðfestir hann eisini, at nú tað sígur samanum fíggjarliga, má landskassin standa sum ein buffari, ið tekur tann ringasta stoytin.

Tað skal landið gera við at byggja út og seta arbeiði ígongd fyri at halda almennum virksemi á einum ávísum støði, nú privata vinnan er í trongstøðu og sigur fólkið upp.

- Og tað er akkurát hesin politikkurin, sum sermerkir álitið, sum fíggjarnevndin hevur lagt fyri Løgtingið, sigur Anfinn Kallsberg.

### Fleiri skerjingar næstu ferð

Eftir álitinum verður hallið á fíggjarlógini næsta ár einar 500 milliónir krónur og tað eru einar 70 milliónir minni enn landsstýrið hevði lagt upp til.

Men Anfinn Kallsberg sigur, at í 2010 verður neyðugt við fleiri skerjingum, tí tá skal hallið helst ikki vera meiri enn 350 milliónir krónur og um eini trý ella fýra ár skal tað helst verða heilt burtur.

- Tað veður ikki lætt og tað fer at seta síni krøv til politiska myndugleikan, tí samstundis sum raksturin má skerjast, fara lønirnar upp.

- Tað er púra greitt, at raksturin kann ikki blíva við at hækka við somu ferð, sum hann er hækkaður hesi seinastu árini, har samfelagið er blivið einar 350 milliónir dýrari at reka fyri hvørt ár.

### Ikki undir umsiting

Hann sigur, at tískil verður neyðugt at tálma vøkstrinum so tað munar fyri at fáa javnvág aftur í búskapin, tí raksturin kann hækka meiri enn búskaparvøksturin.

- Og sum útlitini eru nú, eru ongi útlit fyri búskaparligum vøkstri tey næstu árini.

Annfinn Kallsberg mælir tí staðiliga frá at pilka meiri við tey tølini, sum fíggjarnevndin hevur sett á fíggjarlógina fyri næsta ár.



*Hetta er ikki ein spurningur um at yvirliva, tí so illa stendur ikki til. Tað snýr seg um at taka tey røttu politisku stigini ta røttu løtuni, tí so ber væl til at stýra ímillum skerini uttan at gera ilt verri, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum*

Hann er fullgreiður yvir, at tað er eitt hav av góðum forkláringum upp á, hví nógvar játtanir eiga at verða hækkaðar næsta ár.

- Men yvirskipaða endamálið hjá okkum má vera at fáa javnvág á fíggjarlógina um eini trý, fýra ár. Tað endamálið mugu vit seta okkum longu nú og tískil verður neyðugt at tálma og skerja raksturin.

- Standa vit ikki fast, er tað skjótt, at hallið kann blíva enn størri næsta ár og so verður tað skjótt ein spurningur um, at tað verður onkur annar, sum setir treytirnar fyri okkum og tað mugu vit fyri alt í verðini fyribyrgja.

- Tað fer at gera tað nógv tórførari at fáa fíggjarligu viðurskiftini í rættlag og vit kunnu ikki í fleiri ár hava 500 milliónir enn hetta og slett ikki eitt størri hall enn hetta.

Men hinvegin vil hann als ikki siga, at tey næstu árini verður ein spurningur um yvirlivilsi hjá føroysku tjóðini.

- Tað verður tað ikki, tí tað hava vit politiskt støðufesti, fer tað at bera væl til at stýra ímillum skerini, uttan at gera ilt verri, sigur Anfinn Kallsberg.

- Tað verður ein spurningur um at taka tey røttu stigini ta røttu løtuna, leggur formaðurin í fíggjarnevndini afturat.

# Hallið komið niður á 500 milliónir

**Næstan alt nýtt virksemið, sum ætlanin var at seta í verk næsta ár, verður strikað, men íløgur skulu gerast kring landið fyri at halda virksemið ígongd, sæst á fíggjarlógini fyri næsta ár, sum nú skal samtykkjast endaliga**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Næsta ár fer hallið á fíggjarlógini at vera einar 500 milliónir krónur.

Tað er greitt, eftir at fíggjarnevndin hevur verið við sjóneyku og kritiskum brillum ígjøgnum allar játtanir á fíggjarlógini.

Og í gjár legði fíggjarnevndin so sína niðurstøðu fyri Løgtingið.

Og har sæst, at samanlagt minkar hallið nakað væl aftur ímóti tí, sum landsstýrið hevði stungið út í kortið

Tey heilt endaligu tølini eru ikki komin á enn, men tað er greitt, at fíggjarnevndin ætlar, at næsta ár skal hallið verða umleið 500 milliónir.

Tá er roknað við almennum íløgum upp á 240 milliónir krónur og í hesum sambandi hevur fíggjarnevndin lagt seg eftir at spjaða íløgurnar um alt landið.

- Tá ið landsstýrið legði uppskotið fram, varð hugt eftir, hvussu játtanin er í ár og hvat nýtt virksemið ætlanin var at seta í verk næsta ár, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini.

Hann sigur, at í hesum sambandi hevur landsstýrið boðað frá, at næsta ár er ætlanin at seta nýtt virksemi ígongd, sum hevði kravt 118 nýggj, almenn starvsfólk.

Fíggjarnevndin hevur tikið tað allarmesta av hesum nýggja virksemi burtur av aftur.

Í hesum sambandi hevur fíggjarnevndin hugt eftir nýtsluni á teimum ymsu stovnunum 11 teir fyrstu mánaðirnar í ár og so rokna nýtsluna fyri desember út eftir tí og soleiðis er komið fram til ársnýtsluna.

- Vit hava tikið játtanina fyri í ár og hava so hækka tær 3% fyri at leggja upp fyri lønarvøkstrinum, sigur Anfinn Kallsberg.

- Prinsippið hevur verið, at virksemið skal ikki økjast næsta ár.

- So er tað onkur stovnur, sum ikki hava havt fult virksemi í 2008. Vit hava ikki hugt eftir játtanini, men bara eftir tí, sum er brúkt

So eru tað stovnar, sum hava bundið seg til fleiri útreiðslur í desember, eitt nú við fleiri starvssetanum, fáa teir ein trupulleika næsta ár, tí játtanin hækkar bara eftir nýtsluni 11 teir fyrstu mánaðirnar í ár og ikki eftir játtanini, sigur formaðurin í fíggjarnevndini.

Kortini hevur fíggjarnevndin lagt uppfyri tí virksemið, sum tað ikki slepst undan at hækka, eitt nú har skúlar hava tikið størri og fleiri flokkar inn.

- Tað virksemið heldur fram, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at so leingi búskapurin ikki veksur, er heilt ómøguligt at lata raksturin veksa.

Men kortini vil tað almenna halda hjólini ígongd og tí er umráðandi at tað almenna ger íløgur fyri at haldavirkseminum ígongd.

- Íløgurnar eru ikki varandi, men eru burtur, tá ið tær eru lidnar og tær kunnu eisini niðurlagast, tá ið tíðirnar batna, uttan at tað fær avleiðingar, sigur Anfinn Kallsberg.